# Syngjandi í há

Guðrun Sólja Jacobsen



*Ongin ivi var millum dómararnar um, hvørjar skuldu víðari úr fjórða innleiðandi umfarinum í sjálva finaluna. Og tað vóru heili 44 og 31 % av hyggjarunum hjá DR fríggjakvøldið samd við teimum í. Føroyska Guðrun Sólja Jacobsen fór so syngjandi í hálvfinaluna og danska Lene Matthiesen við*

*Mynd: DR/Bjarne Bergius*

**Við sínari egnu heilt serligu tulking av vakra John Lennon lagnum Imagine, lat Guðrun Sólja Jacobsen fríggjakvøldið ongan iva vera um, at hon framvegis er Stjørna í eitt kvøld**

STJØRNA Í EITT KVØLD

*Solby A. Eliasen, solby@sosialurin.fo*

**Århus:** " Jeg vidste det!"

Hesi orð segði managarin hjá Guðruni, John Christoffersen, og leyp upp úr sofuni í forhøllini í DR, tá Natasja Crone fríggjakvøldið almannakunngjørdi, at Guðrun Sólja Jacobsen hevði vunnið fjórða innleiðandi umfarið av Stjørna í eitt kvøld við nærum helvtini av atkvøðunum.

Fáar minuttir framman undan megnaði hann tó ikki at fjala sínar nervar fyri, hvussu leikur mundi fara at ganga. Hetta uttan iva tí, at tað vóru fleiri, sum søgdu, at Guðrun helst ikki fór at vinna, tí sangurin var ov stillur. Ja, onkur segði enntá keðiligur. John Christoffersen spurdi fleiri av fólkunum í høllini, hvør tey væntaðu fór at vinna. Fleiri gittu Katrine Pinholdt Hall, sum rokkaði á pallinum við kenda ABBA lagnum Gimme Gimme Gimme.

Men tað vóru heili 44 % av hyggjarunum ikki samd við teimum í. Guðrun fór so syngjandi í hálvfinaluna, og frøin var stór. Bæði á henni og teimum, ið sótu í salinum og heppaðu upp á hana. Nummar tvey í innleiðandi umfarinum gjørdist Lene Matthiesen við 31 % av atkvøðunum. So ikki kann annað sigast enn, at tað hetta kvøldið var talan um tveir sannførandi hálvfinalistar. Tær struku avstað við tilsamans 75 % av samlaðu atkvøðunum.

## Feitur sangur

Guðrun var sjálv vælnøgd við, hvussu tað gekk hjá henni undir sjálvari framførsluni. Hon segði, at prøvarnir dagarnar frammanundan eisini høvdu gingið væl, og tað var hon sera glað fyri. Oyrasnigilin hjá Guðruni órógvaði hana tó eitt sindur undir sjálvari framførsluni, men tað sigur hon bara var tí, at hann strammaði ov nógv ta einu løtuna. Tað bilti tó ikki, og nervaði sanniliga ikki hennara framførslu.

Guðrun dylir ikki fyri, at tað var nakað heilt annað at vinna hesuferð.

- Tað er als ikki á sama hátt. Ikki so nógvar innilæstar gleðiskenslur, sum bara ikki sleppa út. Sjálvandi eri eg glað, men tað er ikki tað sama sum fyrstu ferð, segði Guðrun.

Hennara tulking av Imagine hjá John Lennon var heilt serlig og mundi fara inn undir húðina á flestu áhoyrarunum. Spurd um, hví júst tað var Imagine, sum hon valdi, svaraði Guðrun púra avgjørd:

- Imagine er ein feitur sangur við einum deiligum boðskapi.

Guðrun hevur ikki gjørt av, hvør sangurin til hálvfinaluna skal vera, men um hon kemur í sjálva finaluna, so verður tað tann sami sangurin sum til hálvfinaluna.

Imagine er nevniliga á fløguni, sum júst er komin út, so hann kann hon ikki syngja til finaluna, um hon sleppur víðari.

## Væntaði onki

Guðrun sá annars út til at vera eitt sindur bilsin av, at hon vann. Tá hon hoyrdi sítt navn verða nevnt, talaði andlitsbráið hjá henni fyri, at hon ikki hevði væntað at vunnið.

Hetta viðgongur hon og sigur í sama andadrátti, at støðið á kappingini var nógv hægri hesuferð.

- Eg væntaði onki. Ikki soleiðis at skilja, at eg ikki hevði vónina, men øll vóru so góð í kvøld, og tá eg nú havi vunnið einaferð fyrr, so er tað ikki so lætt at endurtaka tað, segði stjørnan beint sum hon kom til afterparty á Train.

Tá Guðrun var liðug at syngja á pallinum og upptøkutólini vóru sløkt, tók tað drúgva tíð at fáa hana niður av pallinum. Ikki tí at hon ikki vildi sjálv, men øll vildu heilsa upp á hana.

---

Ási Jacobsen:

## Øgiliga spennandi

**Pápi Guðruna og fleiri onnur í familjuni umframt vinfólk vóru tilstaðar í salinum fríggjakvøldið, tá Guðrun vann fjórða innleiðandi umfarið í "Den sidste mission"**

STJØRNUPRÁT

*Solby A. Eliasen, solby@sosialurin.fo*

**Århus:** Føroyingarnir settu sjálvandi teirra dám á Stjørna í eitt kvøld við føroyskum fløggum og rópum. Pápi Guðruna, pápabeiggi hennara og abbadóttir hansara, beiggi Guðruna og fleiri vinfólk vóru millum áhoyrararnar hesa løtuna. Tey vóru øll á einum máli um, at tað var nógv meira spennandi til hesa kappingina enn seinast.

Ási Jacobsen, pápi Guðruna, segði aftaná, at hann ikki hevði væntað, at dóttirin fór at vinna so sannførandi.

- Hetta var so nógv meira spennandi, tí nú hevur hon vunnið fyrr, segði hann brosandi, meðan hann heilsaði upp á tey mongu glaðu fólkini, sum komu at ynskja honum til lukku við dótrini.

Ási heldur, at Guðrun hevur ment seg sera nógv sum sangarinda, síðani fyrstu ferð hon steig á pallin í Stjørna í eitt kvøld við balladuni Promise me.

- Tað kanst tú ætla, at hon hevur. Hon hevur jú sungið so nógv síðani, og nú fer hon at hava úr at gera aftur. Fyrst hevur hon vunnið her í kvøld, og mánadagin kemur fløgan eisini út, sigur hann.

Familjan á Tvøroyri hevur tó havt Guðruna heima í nærum ein heilan mánað á jólum, so hon hevur veruliga fingið ladað upp til strævnu tíðina, sum liggur fyri framman.

Ási skuldi vera hjá Guðruni í nakrar dagar, áðrenn leiðin gekk upp aftur til Føroya.

- Ein pensjionistur sum eg, hevur ikki so øgiliga nógv at takast við, so eg kann tað sama royna at stuðla dótrini, tá tað ber til, segði Ási Jacobsen, áðrenn hann fór úr salinum.